# Brekað í Suðuroy hart rakt av sparingum

**Bussurin hjá varda Verkstaðnum í Vági er nú spardur burtur. Avleiðingin er, at fleiri brekað mugu halda uppat á Verkstaðnum**

SPARING
*Áki Bertholdsen*

Á varda Verkstaðnum í Vági er lagið í botni. Orsøkin er, at í næstu viku, mugu fimm av teimum, sum hava havt sína dagligu gongd har, halda uppat á Verkstaðnum.

Tað eru sparingar hjá Landsstýrinum sum gera, at tey nú mugu halda uppat á Verkstaðnum.

Játtanin hjá Almana- og Heilsumálastýrinum til Serstovnadeildina strekkir ikki til og tí skal sparast.

Og ein av sparingunum er, at vardi verkstaðurin í Vági hevur fingið boð um at niðurleggja koyringina hjá bussinum, sum er knýttur á versktaðnum.

Talan er um bussin, sum koyrir tey brekaðu heimanífrá í allari Suðuroynni, á Verkstaðið hvønn morgun at arbeiða og koyrir tey heim aftur um kvøldið.

Men nú er greitt, at bussurin koyrir bara hesa vikuna afturat, tí 1. oktober skal koyringin halda uppat.

Ætlanin er so, at tey brekaðu, sum brúka Verkstaðið, skulu koyra til og frá við Bygdaleiðum

Tað, sum Landsstýrið sparir við at niðurleggja koyringina, er 100.000 krónur um árið.

Hinvegin heldur bussurin fram at koyra fólk til fysioterapi, svimjing og annað - fyribils í hvussu so er.



– Bussurin, sum koyrir tey brekaðu til og frá varda Verkstaðnum í Vági skal nú halda uppat fyri at spara 100.000 krónur um árið. Avleiðingin verður at fleiri brekað mugu gevast at brúka Verkstaðið

*savnsmynd*

### Stórar avleiðingar

Tað fer at fáa stórar avleiðingar fyri tey brekaðu, sum brúka Verkstaðið, at busskoyringin nú má halda uppat.

Palli Jacobsen, sum er leiðari á Verkstaðnum, sigur, at hann hevur greitt serstovnadeildini frá, at hendir tað, at bussurin má gevast, fer virksemið hjá Verkstaðnum at minkað ein triðing,

Hetta er tí, at fleiri av teimum, sum brúka Verkstaðið mugu halda uppat, um bussurin gevst.

Leiðarin á verkstaðnum sigur, at tað er púra greitt, at heldur bussurin uppat at koyra, vera tað fimm av teimum 15 brúkarunum, sum ikki longur fáa arbeitt á verkstaðnum.

Harafturat var ætlanin at onkur skuldi koma á Verkstaðið afturat eitt sindur seinni, men tey hava givið avboð, nú bussurin heldur uppat.

Talan er fyri tað mesta um fólk, sum búgva á Tvøroyri.

– Hetta eru brekað fólk, sum eru so illa fyri, at tey hava brúk fyri serflutningi og tí hava tey ongan sum helst møguleika at koyra aftur og fram við Bygdaleiðum soleiðis sum ætlanin nú er.

Hann sigur, at bussurin hjá Verkstaðnum koyrir heim eftir fólki og koyrir tey aftur til dyrnar.

– Tað er neyðugtfyri at hesi fólkini kunnu brúka Verkstaðið, tí tey eru so illa fyri. Men hesa tænastu veitir Bygdaleiðir ikki og tað er ongin møguleiki hjá hesum fólkum at ferðast til og frá steðgiplássunum hjá Bygdaleiðum, tí tað er ov langt.

Hann sigur eisini, at koyringin hjá Bygdaleiðum passar stak illa til upp- og afturlatingartíðirnar hjá Verkstaðnum.

Palli Jacobsen sigur, at tey hava verið í sambandi við Bygdaleiðum fyri at vita, um tey fáa Bygdaleiðir at átaka sær hendan flutningin eisini.

– Men haðani kom onki svar. Nú hevur leiðslan á Serstovnadeildini aftur skrivað til Bygdaleiðir at vita, um tey kunnu átaka sær flutningin.

Men yvirhøvur hevur Palli Jacobsen onki álit á, at tað fer at bera til at fáa Bygdaleiðir at veita teimum brekaðu somu tænastu, sum tey hava, nú Verkstaðið sjálvt hevur havt busskoyringina.

- Bygdaleiðir er ikki fyri fólk, sum ikki eru fullfør. Talan er í nógvum førum um serflutning og um fólk, sum skulu hjálpast í bussin og úr honum aftur og sum mugu heintast heima og koyrast aftur til dyrnar. Og tað skal vera løgið, um Bygdaleiðir kunnu átaka sær tað uppgávuna eisini uttan at tað fer at kosta nógv meiri – í hvussu so er ikki nú Bygdaleiðir skulu á privatar hendur.

Palli Jacobsen heldur, at tað er stórt spell, at tað nú verður neyðugt at minka um virksemið hjá varda Verkstaðnum.

– Heldur áttu vit at økt um virksemið, tí tað hava vit møguleikar til til - og tað eru fólk, sum hava hug at koma á Verkstaðið.

# Fagnaður til lívið



*Fríggjadagin fara ímillum 1.500 - 2.000 børn úr øllum landinum at fagna lívinum á stórum tiltaki, sum Javni skipar fyri í Ítróttarhøllini í Havn*

**Á stórum tiltaki fyri børn í Ítróttarhøllini á Hálsi fríggjadagin, fer Javni at fegnast um alt, sum er lívgevandi, børn, fuglar, dýr, blomstur, fiskar og mangt annað**

BARNAFAGNAÐUR
*Áki Bertholdsen*

Fríggjadagin skipar felagið Javni fyri stórum tiltaki fyri smærri børn í Ítróttarhøllini í Havn.

Tiltakið er fyri børn ímillum fimm og 10 ár og tað verður fríggjadagin frá klokkan 10 til klokkan 16.

Hetta er ein barnafagnaður, sum gongur undir heitinum “Lívið”

Javni sigur, at endamálið við tiltakinum er geva børnum fáa møguleika at møta øðrum børnum.

– Somuleiðis er endamálið at hjúkla um tað fjølbroytni, ið hoyrir við til tað at vera barn.

Javni hevur bjóðað øllum børnum í Føroyum í millum 5 og 10 ár til til Barnafagnaðin. Innbjóðingar eru sendar til skúlar, barnagarðar og dagrøktir. Somuleiðis eru foreldur vælkomin við børnum, hóast tað ikki gongur stovn.

### Fegnast um lívið

Hetta er fyrstu ferð at Javni hevur tiltak burturav til smærri børn, og tað verða sanniliga nógv børn við.

Eini 1.500 børn úr øllum landinum hava boðað frá luttøku, so tilsaman verður roknað við, at eini 2.000 fólk í Ítróttarhøllini í Havn hendan dagin.

Vanlig leikluturin hjá Javna er annars alla tíðina at vísa myndugleikunum á tørvin hjá teimum minni mentu í samfelagnum.

– Hesaferð hava vit valt at gleðast yvir lívið. Á Barnafagnaðinum fara vit at vísa á tað, ið er lívgevandi: Børn, fuglar, djór, blómur, fiskar og mangt annað, sigur Javni.

Á Barnafagnaðinum verður eisini hugsað um, at tey veikastu børnini, sum ofta ikki er pláss fyri í almennum tiltøkum, so at eisini tey kunnu verða við hesuferð.

Í sambandi við tiltakið hevur Javni heitt á lærarar og pedagogarar, um at fortelja børnunum um felagið áðrenn tey koma, og at hava eitt pappírklipp við, til at hanga upp á eitt net í høllini.

Javni sigur, at børnini kunnu koma og fara tá ið tey vilja, tað er sostatt ikki neyðugt at vera í Ítróttarhøllini allan dagin

Tað er ein flokkur á Pedagogskúlanum, sum skipar fyri tiltakinum saman við Javna og tey fegnast øll um, at tað er so stórur áhugi fyri at vera við.

– Vit vænta ein lívgevandi dag í Ìtróttarhøllini á Halsi í Havn.

### Nógv á skránni

Tað verða nógv tiltøk á skránni hendan dagin í Ítróttarhøllini.

Millum annað verða verkstaðir við ymsum at evna til, klovnar, djóragarður, ítróttur við kendum leikarum, bókaframsýning og framførðslur á pallinum. Har verður eisini eitt serligt tiltak ið tey nevna “at sansa”.

Tað verður Maud Wang Hansen, leiðari á verkstaðnum Vón, ið kemur at seta Barnafagnaðin og seinnapartin kemur Løgmaður at vitja børnini.



# Hafnia víðkar um virksemið



*Hotel Hafnia fer at víðka um virksemið í húsunum. Enn tykist tað heldur rokmikið, men ein hugnalig lounge ella uppihaldsstova verður latin upp í næsum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Hotel Hafnia í Havn arbeiðir í løtuni við at gera eina lounge ella uppihaldsstovu á veghæddini. Hetta er eitt ískoyti til hotellið og matstovuna og ikki ein kapping við onnur støð, sigur stjórin. Væntandi verður latið upp um eina viku**

HOTEL
*Stefan í Skorini*

Hotel Hafnia hevur higartil ikki havt nakað uppihaldsrúm, har gestirnir kunnu dvølja eina stund, ella har fólk kunnu sita áðrenn ella aftaná, tey hava vitjað matstovuna.

Í næstu viku letur eitt nýtt høli upp í Hotel Hafnia, og tað er Lounge Hafnia, sum tað verður nevnt. Enn er ikki klárt at lata upp, tí handverkararnir skulu leggja seinastu hond á verkið. Skeinkiloyvið er heldur ikki komið uppá pláss enn, men hetta verður væntandi eingin trupulleiki.

– Hetta er eitt stað, sum gestirnir á hotellinum hava saknað. Tað er vanligt hjá hotellum í hesum flokkinum at hava eina lounge, har gestirnir kunnu seta seg niður í hugnaligum umhvørvið, og tí lata vit eisini gera eina slíka, sigur Johan M. Restorff, stjóri á Hotel Hafnia.

### Ikki kapping

Hann leggur dent á, at hetta ikki verður nakað vertshús ella líknandi, sum skal kappast við onnur støð í býnum. Ætlanin er, at hetta skal vera eitt ískoyti til hotellið og matstovuna, so gestirnir kunnu fáa betri tænastu.

Pláss vera fyri umleið hálvthundrað fólkum í hølunum, sum skulu hava ein hugnaligan dám.

– Vit ætla, at tað skal vera ein ávísur stílur yvir hesum, og tí gleða vit okkum til at lata upp, sigur stjórin um hølini, sum eru har handilin Drós var fyrr við síðuna av hárskeranum Lyngsø. Latið verður ikki upp, fyrr enn hølini eru heilt klár og loyvini eru fingin uppá pláss.

Ætlanin er, at um dagin ber til at koma inn at fáa sær ein drekkamunn av onkrum slag. Um kvøldið er Lounge Hafnia mest ætlað sum ein forlongdur armur hjá matstovuni, har fólk kunnu bíða eftir borði, og har gestirnir kunnu lesa bløðini og annað.

Inngongdin verður ígjøgnum móttøkuna á hotellinum og ikki beinleiðis frá vegnum.




*Hetta skeltið ber boð um, at Lounge- Salong Hafnia letur upp í næstum, og har verður pláss fyri hálvthundrað fólkum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Nýtt slag av mjólk




*Lættimjólk er nýggja slagið av mjólk, ið MBM sendir á marknaðin. Fitiinnihaldið er lágt, haðani navnið Lættimjólk*

**Í dag, mikudagin, sendir Mjólkarvirki Búnaðarmanna eitt nýtt slag av mjólk á marknaðin**

MJÓLK
*Stefan í Skorini*

Nýggja slagið nevnist Lættimjólk, og í hesi mjólkini eru bara 0,5% av fiti. Tað er ein triðingur av fitiinnihaldinum í hálvskúmaðari mjólk. Í smakki og útsjónd er lættimjólk eisini rættiliga lík hálvskúmaðari mjólk.

Lættimjólk verður viðgjørd eins og onnur mjólk. Á mjólkarvirkinum verður mjólkin skilvundin. Rómin er lættari enn skúmaða mjólkin og savnast í miðjuni og kann tískil takast frá.

Síðani verða skúmað mjólk og rómi blandað í tí lutfalli, at fitiinnihaldið verður 0,5%. Mjólkin verður síðani fitijavnað, so rómin verður javnt býttur í mjólkini, og mjólkin fær ein dygdarbetri smakk.

Fyrri liður í orðinum lættimjólk kemur fyri í nøkrum føroyskum orðum og merkir »eitthvørt, ið er lætt«. Til dømis kann verða nevnt lættitorv, lættisoppur og lættikorn. Lættimungi er til skjals í orðabók J.C. Svabos við merkingini »tunt øl«.

Mjólkarvirkið sendir hesa løttu mjólkina á marknaðin, tí nógvum dámar ikki tað skúmaðu mjólkina í grønum pakkum. Í henni er fitiinnihaldið bara 0,1%. Tann mjólkin er kanska heldur tunn og vatnkend, men hetta nýggja slagið skal vera leskiligari og eitt lítið sindur feitari.